# Oljufeløg skipa sítt egna áhugafelag



*Frá seinasta GEM-fundinum, sum varð hildin í Havn.*

*Mynd Jens K Vang*

**FOÍB ella Føroya Oljuídnaðarbólkur eitur áhugafelag ella yrkisgagn, sum tey 12 oljufeløgini við leitiloyvi í Føroyum nú stovna.**

OLJUFELØG Í FØROYUM
*an r*

Tíðin er nú farin frá GEM-samstarvinum millum oljufeløgini og føroyskar myndugleikar – ella rættari, GEM hevur loyst sínar uppgávur – og verður í hesum sambandi tikið stig til eitt heilt nýtt tiltak undir heitinum FOÍB, sum stendur fyri Føroya Oljuídnaðarbólkur. Hetta er eitt áhugafelag hjá teimum 12 oljufeløgunum, sum hava fingið leitiloyvi á føroyska landgrunninum. FOÍB, sum verður felags yrkisgagn hjá oljufeløgunum, hevur sum høvuðsendamál at samskipa og loysa felags tvørgangandi spurningar, ið koma at taka seg upp í kjalarvørrinum av eini komandi oljuvinnu.

Sosialurin skilur, at tað hevur verið arbeitt við hesum sokallaða áhugafelagnum í eina tíð, og nú er so tíðin komin til at seta tað í verk. Umboð fyri øll oljufeløgini eru komin til Havnar í hesum sambandi og verður kunnandi fundur um tiltakið týsdagin.

## GEM givið úrslit

Hetta merkir, at GEM-samstarvið verður upployst. GEM hevur annars útint sínar mongu uppgávur og hevur sum so verið sera hent hjá bæði føroyskum myndugleikum og hjá oljufeløgunum. Byrjanin til GEM var eitt ynski um at seta gongd á og samskipa umhvørvisarbeiðið nú undan tí fyrstu oljuboringini. Fleiri undirbólkar hava arbeitt undir GEM við umhvørvi, veðurspurningum, jarðfrøði og trygd. Úrslitið av øllum tí nógva innsavnaða tilfarinum frá teimum mongu GEM-verkætlanunum er ein databasi, sum kann verða sera hentur hjá øllum, sum hava okkurt tilknýti til komandi oljuvinnu.

Leiðari fyri GEM øll hesi árini hevur verið Halvor Snarvold frá Statoil og verður tað uttan iva eisini hann, sum kemur at standa á odda fyri nýggja tiltakinum FOÍB. Frá føroyskari síðu hevur so Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni verið eitt av oddafólkunum í GEM-arbeiðinum. Atlanticon hevur so virkað sum skrivstova hjá GEM-samstarvinum og bendir alt á, at Atlanticon fer at taka sær av teimum praktisku og fyrisitingarligu uppgávunum hjá FOÍB eisini. Leiðari á Atlanticon er Hilmar Eliassen.

Hann sigur við Sosialin, at nú vit siga farvæl til GEM, man fáur ivast í, at hetta samstarvið hevur havt stóran týdning. Uppbygt er eitt forstáilsi av øllum tí føroyska landgrunninum, sum vit ikki hava havt áður. Tað hevur so eisini verið við til at lyfta upp granskingarstøðið í Føroyum, soleiðis at bæði føroyskir granskarar og stovnar hava verið við í teimum avbjóðingum, sum GEM-verkætlaninar hava havt við sær.

Ringt er at seta á júst hvussu nógv GEM-verkætlanin hevur kostað, men tað man liggja einastaðni millum 20 og 30 mill. kr. ella meira. Hetta eru pengar, sum oljufeløgini hava latið. Men føroyskir stovnar hava so sett fólk og orku til tær ymsu uppgávurnar.

Hvat verða tað so fyri spurningar, sum nýggja felagið FOÍB fer at taka sær av kundi verið spurt. Til tað er at siga, at tað fer at taka sær av málum, sum eru frammi í tíðini, og sum bæði hava við oljufeløgini og føroyska samfelagið at gera. Eitt nú skattaspurningar. Sum so kann sigast, at hetta nýggja felagið fer meira at takast við samfelagsligar spurningar, meðan GEM tók sær av meira fakligum spurningum, sum hava við eina komandi leiting at gera. GEM var meira ein partur av forkanningunum til ta leiting, sum, nú skal fara í gongd og sum kanska endar við framleiðslu um nøkur ár. Har metir man seg so at hava rokkið á mál í tí málsetningi, sum varð settur fyri nøkrum árum síðani. Nú verða so nógv nýggj evni at taka upp.




*Á hesum GEM-fundinum varð tosað um trygd og lógarvirksemi í sambandi við komandi leiting.*

*Mynd Jens K. Vang*

ítróttur

Nr. 50 • týsdagur • 13. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stíla móti HM

**Fýra føroyskar gentur hava ætlanir um at sleppa til HM-kapprógvin í sonevndum outriggarum**

RÓGVING
*Jákup Mørk*

Tá føroyingar tosa um kappróður, eru tað aloftast teir føroysku bátarnar, at tosað verður um. Sum so er einki løgið í tí, men seinnu árini hava so sanniliga eisini prógvað, at føroysk róðrarfólk eisini duga annað enn at rógva í serstaku føroysku bátunum.

Kappingin í Scilly-Oyggjunum hevur prógvað, at okkara rógvarar eisini kunnu standa seg millum tey bestu í heiminum, men tað er ikki bara her, at føroyingar hava gjørt vart við seg.

## Danskir meistarar

Fyri hálvum ári síðani eydnaðist tað nevnliga fimm føroyskum gentum at vinna DM í rógving í sonevndum in-riggarum, og tríggjar av hesum hava nú ætlanir um at gera seg galdandi í flokkinum, sum verður rópt out-riggarar. Umframt tær tríggjar, sum longu hava vunnið gull - Katrin Olsen, Katrin Rubek Nielsen og Beinta Hansen – er Sigrid Svartá nú eisini komin í bátin. Tær tríggjar fyrst nevndu vóru í fleiri ár partur a suverenu manningini á Jarnbardi, meðan Sigrid í nøkur ár hevur róð við kvinnunum á Hvessingi.

Ein av føroysku gentunum, Katrin Olsen, sigur við Sosialin, at rógving í hesum bátaflokkum er fullkomuliga øðrvísi, enn tað at rógva í førosykum bátum.

– Her er so øgiliga nógv meira talan um teknikk, tá tú rørt. Javnvágin í bátinum skal alla tíðina vera í lagi, tí báturin er sera smalur, og tolir tí ikki tað stóra, um vit hava hug at vagga frá síðu til síðu.

– In-riggarin, sum vit róðu í at byrja við, er heldur breiðari, men eisini har er stórur munur í mun til føroysku bátarnar, sigur Katrin, sum eisini sigur, at talan heldur ikki er um sama bátaflokkin, sum verður nýttur á Scilly oyggjunum.

## Tungt at sleppa til kapping

Sum nevnt, so hav tríggjar av gentunum longu verið danskir meistarar, og Katrin sigur, at tað alla tíðina hevur verið ætlanin, at tær skuldu rógva kapp undir onkrum umstøðum.

– Eg flutti niður um heystið í 1999, og tað var rættiliga skjótt, at vit funnu saman, og settu okkum fyri at fara at rógva. Tað er tó ikki bara sum at siga tað, um tú ætlara at rógva kapp í Danmark, sigur Katrin.

– Vit gjørdu snøgt sagt tað, at vit hugdu í telefonbókina, og har funnu vit so eitt felag, sum vit meldaðu okkum inn í. Tað gekk tó ein tíð, áðrenn vit høvdu gjørt øllum greitt, at vit eisini vildu við í kappingar. Í Danmark er stórur parturin av limunum í róðrarfeløgunum bara við fyri at motionera, men tað var ikki tað, sum vit ætlaðu.

– Tað eydnaðist okkum so at enda at sleppa við til DM fyri in-riggarar, og sum kunnugt, so gekk hetta upp á stás.

## Gullið hjálpti

At føroysku genturnar vunnu gullmerki, skuldi eisini vísa seg at fáa avgerandi ávirkan á møguleikar teirra at gera seg galdandi. Eftir hetta eru tær fluttar ein bátaflokk upp, og tær hava eisini fingið ein venjara, sum í øllum smálutum roynir at seta tær inn í, hvussu ein out-riggari skal rógvast.

– Tað er eingin loyna, at vit eru sera fegnar um venjaran hjá okkum, Vagn Nielsen. Hann er ein av avgjørt bestu venjarunum í Danmark, og tá hann kortini var í felagnum hjá okkum, so hildu vit okkum til at spyrja okkum fyri. Grundað á góða úrslitið í DM játtaði hann hesum, og nú er hann við okkum einar tvær til tríggjar ferðir um vikuna.

Katrin leggur eisini afturat, at tað so avgjørt er neyðugt við venjara, um tað skal eydnast teimum at røkka langt í ítróttini.

– Sum nevnt, so hevur hetta slag av rógving sera nógv at gera við teknikkin, og hevur tú ikki ein persónligan venjara, er ringt at fara rætt fram í hesum.

– Vagn hjálpir okkum við øllum hesum, eins og hann helst eisini kemur at hjálpa okkum til kappingar, og hetta eru vit sera fegnar um. Hann hevur verið við til alt hetta sjálvur, og veit tí akkurát, hvussu vit skulu bera okkum at í kappingunum, hvar vit skulu hita upp o.s.fr. Tað einasta, sum vit skulu hugsa um, er at rógva, og hetta er sjálvsagt ein stórur lætti hjá okkum.



*Vagn Nielsen, sum er venjari hjá bátinum, hevur í mong ár róð kapp sjálvur, og telist í dag millum bestu venjararnar í Danmark*

## Hava stór mál

Tá ein í fyrstu royndini hevur vunnið DM, er ikki annað enn náttúrligt at seta sær hægri mál, og tað hava føroysku rógvigenturnar so avgjørt eisini gjørt. At byrja við vóru tríggjar føroyskar á bátinum, men síðani er tann fjórða – ein donsk genta – skift út við enn ein føroying, soleiðis at talan nú er um ein rættiligan føroyskan bát.

Saman hava tær fýra sett sær sum mál at luttaka við komandi HM-kapping, sum verður í Sveis í august mánaði, umframt at tær sjálvsagt ætla at gera seg galdandi, tá DM verður á skránni í heyst.

Uppskriftin til hetta er venjing, venjing og venjing, og Katrin greiðir frá, at tær í løtuni venja upp móti 10 ferðir um vikuna. Hoon viðgongur, at hetta kann vera tungt, tá tú eisini hevur lesnaðin at hugsa um, men við eitt sindur av tilrættisleggjan, hevur tað gingið higartil, og skal málið røkkast, er nógva venjingin neyðug.

– Tað vum vit veruliga satsa uppá, er tó HM-kappingin í 2002, sigur Katrin.

– Vit eru so stutt síðani byrjaðar við hesum bátaslagnum, men vit vóna tó, at vit eisini kunnu sleppa við í ár, tí hetta fer at geva okkum eina rúgvu av royndum, sum vónandi kunnu koma okkum til góðar komandi ár.

## Fáa ikki stuðul

Sum nevnt, so er talan um stór mál, sum tær fýra hava sett sær, men í hesum sambandi hevur Katrin tó at enda eitt hjartasuff. Hetta snýr seg um fíggjarligu tungu byrðuna, sum tær mugu lyfta, um tað skal eydnast teimum at sleppa við til stóru kappingarnar.

– Hvussu langt vit sleppa í luttøku okkara, veldst eisini um, hvussu gongst hjá okkum í teimum kappingum, sum vit taka lut í. Vit royna eisini at sleppa á eina venjingarlegu í Fraklandi, men hetta er sjálvsagt kostnaðarmikið, og við lestri og rógving, er ikki hugsingur hjá okkum at hava nakað starv við síðuna av.

– Vit hava roynt at sett okkum í samband við ymisk føroysk virki, men tað hevur verið so eiðasørt, at nakað av hesum hevur stuðlað. Í nógvum førum hava vit ikki so mikið sum fingið eitt nei, men bara slettis einki aftursvar.

– Sjálvar halda vit í øllum førum, at hetta er sera keðiligt. Vit hava kanska ikki so nógv at bjóða stuðlunum her og nú, men vit høvdu tó vóna, at nakað av vælvild varð sýnt okkum. Sleppa vit við til stóru kappingarnar, haldi eg eisini, at hetta so avgjørt átti at verið góð reklama hjá føroyskum útflutningsfyritøkum. Tað er í øllum førum sera tungt hjá okkum, at einasti frídagurin, sum vit hava um vikuna, skal nýtast til at skriva umsóknir um stuðul ymsa staðni, sigur Katrin Olsen at enda.

Vónandi kemur eisini hetta í rættlag, soleiðis at føroysku kappróðragenturnar kunnu røkka enn longri. Higartil er tað vorðið til gull í Føroyum og Danmark, so hví ikki eisini taka enn eitt fet á leiðini?



*Venjingarnar hjá føroysku getnunum eru úti við 10 í tali um vikuna, so tað er sjálvsagt tungt, um tíðin eisini skal nýtast til at taka sær av fíggjarliga partinum*